# tarar



*Fía og Janus Norðberg vóru millum áhoyrararnar á Baresso í gjárkvøldið*

*Mynd: Erla Torvadal*

skeiðunum, ið Vinnuhúsið skipar fyri.

Í Klaksvík er Íverksetarahúsið nýliga sett á stovn og hevur bert virkað í seks vikur, upplýsti Rani Nolsøe, leiðari. Men hóast stutta tíðarskeiðið, hevði húsið longu veitt ráðgeving til ikki færri enn 20 áhugað, ið hava í hyggju at seta egið virki á stovn. Nevnast kann, at av hesum 20 vóru 11 úr Klaksvík, meðan 6 vóru úr Eysturoynni og trý vóru sanniliga úr Havn!

Alt í alt var hetta sera áhugaverdir hálvurannar tími, og tey, ið umhugsa at stovna egið virki, fingu avgjørt nakað burtur úr kvøldinum.



*Kitti May Ellefsen, býlingastjóri í SMS*

*Mynd: Erla Torvadal*

# íverksetan

**At stovnað egið virkið**

At seta egið virki á stovn í Føroyum ávirkar eisini eina røð av viðurskifum, ið hava týdning, so sum tann generella vinnulóggávan, arbeiðismarknaðarlóggávan og fíggingarmøguleikar.

Tað hevur víst seg, at 95 % av vøruútflutninginum hjá okkum er fiskur og fiskaútdráttur, og tó telur hetta bara 60 % av valutainntøkuni, segði vinnumálaráðharrin.

Bjarni Djurholm eggjar ungdóminum at halda seg til og endaði við at siga: »Eftir er at siga, at tit eru á góðari leið, og at eg stuðli tykkum«

# Nomu sær kunnleika um íverksetan



*Gunnvá Svartá Wennerstrøm og Helena Mortensen fingu nógv burtur úr fyrilestrunum á Baresso í gjárkvøldið*

**ÍVERKSETAN**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ikki allir áhoyrararnir vóru etablerað vinnufólk. Umframt fleiri av luttakarunum Ungt Virki vóru eisini fólk komin, ið høvdu áhuga í at vita, hvussu tú ber teg at við at seta á stovn títt egna virki.

Tveir av hesum áhoyrarum vóru Gunnvá Svartá Wennerstrøm og Helena Mortensen úr Havn. Tær hava í eina tí spælt sær við tankanum um at seta á stovn egið virkið.

- Vit hava starvast saman, og kundu hugsa okkujm, at farið undir eitthvørt sjálvar. Tað er tí virt eru her í kvøld, sigur Gunnvá.

Tær vóru eisini sera fegnar fyri kvøldið og mettu, at tær høvdu fingið nógv burturúr.

Nú vita vit munandi meiri um, hvat skal til fyri at seta á stovn egið felag, og tað sum hevur enn størri týdning: Nú vitga vit, hvar vit kunnu venda okkum fyri at fáa hjálp at byrja sjálvar, siga tær báðar.

Tær hava spælt sær við tankanum um okkurt ávíst, men enn eru hetta bert tankar og ikki nakað ítøkiligt. Einki er tó at ivast í, at tær vóru klókari tá tær fóru avstað aftur, enn tá tær komu. Og hvør veit – tað gongur kanska ikki so long tíð áðrenn vit síggja eitt ítøkiligt úrslit av Íverksetara fyrilestrunum á Baresso hóskvøldið.

## Guðrun Ludvig frá Guðrun og Guðrun:

# Alt er væl ið endar væl




*Guðrun og Guðrun, Guðrun Rógvadóttir og Guðrun Ludvig*

Vit nevndu í blaðnum í gjár, at Guðrun Rógvadóttir frá Guðrun og Guðrun er høvuðsdómari í kappingini Ungt Virki. Hon var eisini ein av fyrilestrarhaldarunum á kunningarkvøldinum á Baresso í gjárkvøldið.

Hin parturin í Guðrun og Guðrun, hon við eftirnavninum Ludvig, var eisini til staðar, og vit nýttu høvið at spyrja, hvussu tilstóð í »troyggjumálinum«.

Málið var kanska eitt sindur blást upp, men Guðrun (Rógvadóttir) var við í sendingini »Aftenshowet« á DR1 í síðstu viku, og har greiddi hon frá málinum og rættaði allar misskiljingar, sigur Guðrun Ludvig.

Fleiri miðlar hava vilja verið við, at nógv umrødda troyggjan er íslendsk, men hetta rættaði Guðrun Rógvadóttir eisini. Somuleiðis var eisini tosað við Sofiu Gråbøl í sendingini.

Alt er væl, ið endar væl, og tað endaði við, at vit fingu rættiliga góða reklamu burtur úr øllum troyggjumálinum, sigur Guðrun Ludvig.

**- leo**